


## Vilt tú vera við til at byggja upp okkara Uttanríkistænastu, fremja okkara uttanríkismál og tryggja føroyingum rúmariræsir í altjóðasamfelagnum?

Í Uttanríkisráðnum umsita vit hópin av spennandi málum, ið hava týdning fyri okkara áhugamál og samstarv í altjóðasamfelagnum, eitt nú at umboða Føroyar í altjóða felagsskapum; at virka fyri útflutningi og frælsum samhandli; at tryggja okkara rættindi og skyldur í altjóða høpi; at skipa fyri mentanarligum og vinnuligum átøkum í øðrum londum og at fremja eina virkna og dagførda kunning um Føroyar. Í løtuni eru hesi størv leys at søkja:

**Deildarstjóri til deild fyri "Human Resource Management"**
Tú fært ábyrgdina av at umsita mannatilfeingi í Uttanríkistænastuni í serliga breiðum týdningi, eitt nú vanligu starvsfólkaviðurskiftini, trivnað, førleikamenning og flytføri hjá starvsfólkum millum deildir eins og millum Uttanríkisráðið og sendistovurnar; at umsita avrikssáttmálar millum Uttanríkisráðið og sendistovurnar; at umsita fíggjarviðurskifti og hølisviðurskifti; og at umsita skjalaskráseting og bókhald, umframt onnur serlig viðurskifti eitt nú trygd og KT-viðurskifti.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

**Skjalavørður**
Tú fært ábyrgdina av at umsita skjalaskráseting og KT-viðurskifti hesum viðvíkjandi, umframt at handfara vitan og upplýsingar, bókasavn, skjalasavn og skjalatrygd hjá allari Uttanríkistænastuni.

Vit vænta, at tú hevur antin nomið tær útbúgving sum bókavørður ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir innanfyri yrkið ella viðkomandi útbúgving á bachelorstigi.

**Fulltrúi í handilspolitikki**
Tú fert saman við øðrum at umsita eina røð av handilspolitiskum málum eitt nú alheimsgerð, altjóða handilspolitikk, Heimshandilsfelagsskapin (WTO), Hoyvíkssáttmálan, Evropiska Fríhandilsfelagsskapin (EFTA), Evropasamveldið (ES) og aðrar fríhandilssamráðingar og fríhandilssáttmálar.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

**Fulltrúi í havpolitikki**
Tú fert saman við øðrum at umsita eina røð av altjóðapolitiskum málum innanfyri hav, tilfeingi, umhvørvi, veðurlagsbroytingar og sjálvberandi menning. Eisini verður føroyski limaskapurin í felagsskapum sum eitt nú Arktiska Ráðnum, OSPAR, FAO, NAFO, NEAFC, NASCO, NAMMCO og IWC umsitin her.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

---

Felags fyri øll størvini er, at tú hevur politiskt tev og góð samstarvsevni, ert tænastuhugaður og lagaligur, ert miðvísur og sjálvstøðugur, ert stinnur í føroyskum og enskum máli, umframt at tú hevur kunnleika til onnur mál. Vinaliga set teg í samband við Joan Ólavsdóttir á telefon +298 296111 ella mfa@mfa.fo at frætta meira um størvini. Umsóknir við prógvum og øðrum skjølum skulu sendast til Uttanríkisráðið, Tinganes, FO-100 Tórshavn ella í telduposti til mfa@mfa.fo og vera frammi í seinasta lagi mánadagin 11. august 2008.

**Føroyska Uttanríkistænastan fevnir um Uttanríkisráðið og sendistovur Føroya til London, Keypmannahavnar, Evropasamveldið og Reykjavíkar og er ein og sami myndugleiki. Høvuðsleikluturin hjá Uttanríkisráðnum er at samskipa føroyska uttanríkispolitikkin og at tryggja áhugamál Føroya í altjóðasamfelagnum.**

UTTANRÍKISRÁÐIÐ
Ministry of Foreign Affairs

Tel. +298 306100 • www.mfa.fo